TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Alvi Mortensen, Anfinn Hammerfoss Leo, tiltakslimur fyri Kristin Michelsen, Annika Pearce, tiltakslimur fyri Bjarna Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Góðkenning smb. kommunustýrislógini i.s.v. innkallan av tiltakslimum | 2 |
| 2 | Skattatøl apríl mánaða 2018 | 2 |
| 3 | Uppskot til samstarvssáttmála við grunnin Thorshavn | 3 |
| 4 | Staðseting av nýggjum skúla - byrjandi umrøða | 5 |
| 5 | Kunning um brúk av kommunulækna-hølum i.s.v. skriv frá Kommunufelagnum | 5 |
| 6 | Tilmæli frá arbeiðsbólki viðv. heimasíðu og møguligum intraneti | 7 |
| 7 | Kunning um støðuna á eldraøkinum í Suðuroynni | 8 |
| 8 | Uppskot til visjón, tilveru- og virðisgrundarlag fyri Tvøroyrar kommunu | 9 |

tlf 371095
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**81.00.00-A00-7-17**

## 1. Góðkenning smb. kommunustýrislógini i.s.v. innkallan av tiltakslimum

### Málsfrágreiðing

Býráðið skal sambært § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini taka støðu til um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimunum Anniku Pearce fyri Bjarna Hammer, býráðslim, og Anfinn Hammerfoss Leo fyri Kristin Michelsen, býráðslim og borgarstjóra, eru loknar.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at góðkenna val av tiltakslimunum Anniku Pearce og Anfinn Hammerfoss Leo.

### Skjøl

- Móttøkuváttan frá Anfinn H. Leo
- Móttøkuváttan frá Anniku Pearce
- Kunning frá Bjarna Hammer, um at hann ikki møtir á býráðsfundi
- Kristin Michelsen boðar frá, at hann fer í feriu frá 7. mai 2018 at rokna

**25.20.00-100-1-18**

## 2. Skattatøl apríl mánaða 2018

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Málsfrágreiðing

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri apríl mánaða 2018 og higartil í árinum sum heild.

**Fíggjarnevndin, 3. maj 2018, pkt. 1:**
Fíggjarnevndin tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2017-2018.xlsx
- Samanbering av skatti við undanfarin ár

**17.00.00-I00-1-18**

## 3. Uppskot til samstarvssáttmála við grunnin Thorshavn

### Málsfrágreiðing

Við støði í býráðssamtykt 9. apríl 2018, er uppskot gjørt um samstarvssáttmála millum Tvøroyrar kommunu og sjálvsognargrunnin Thorshavn, sí viðfesta uppskot og skjøl í málinum annars.

**Mentanarnevndin, 26. februar 2018, pkt. 1:**
Mentanarnevndin er sera jalig viðvíkjandi ætlanini, men ynskiligt er at frætta meira um hvussu skúlin ætlar at leggja undirvísingina til rættis. Ynskiligt er at lærarin, ið kemur at standa fyri undirvísingini, kemur at kunna mentanarnevndina meira um ætlanina. Semja er um at biðja um fund við viðkomandi persónar týsdagin 6. mars kl. 15:30.

**Mentanarnevndin, 26. marts 2018, pkt. 1:**
Mentanarnevndin samtykti, at gerast skal ein samstarvssáttmáli við grunnin Thorshavn, sum inniber, at Tvøroyrar kommuna veitir Thorshavn eina árliga játtan á kr. 30.000,- sum fatar um Thorshavn sum part av sjóvinnubreytini í Tvøroyrar skúla umframt at aðrir skúlaflokkar kunnu fara túrar við Thorshavn uttan eykakostnað, sí tilboð frá M/S Thorshavn til Tvøroyrar skúla, dagfest 27. januar 2018. Nevnda játtan hongur saman við, at Tvøroyrar kommuna í eitt 2-ára tíðarskeið hevur stuðla Thorshavn við kr. 60.500,-

Málið verður lagt fyri fíggjarnevndina og býráðið til endaliga støðutakan.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 4. apríl 2018, pkt. 3:**
Meirlutin í fíggjarnevndini Kristina Roest og Bjarni Hammer samtyktu, at taka undir við tilmælinum frá mentanarnevndini. Borgarstjórin tekur støðu á býráðsfundinum.

Fíggjarnevndin viðmerkti, at stuðulin til Thorshavn fer av játtanini hjá mentanarnevndini.

**Býráðið, 9. apríl 2018, pkt. 2:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini, og at tað verður gjørdur ein samstarvssáttmáli millum Tvøroyrar kommunu og Thorshavn, sum verður eftirmettur á várið 2019 áðrenn skúlaárið endar.

**Mentanarnevndin, 30. apríl 2018, pkt. 11:**
Mentanarnevndin tók undir við uppskoti til samstarvssáttmála millum Tvøroyrar kommunu og sjálvsognargrunnin Thorshavn. Samstarvssáttmálin verður lagdur fyri býráðið til endaliga støðutakan.

**Avgerð**

Býráðið samtykti einmælt, at góðkenna samstarvssáttmálan millum grunnin Thorshavn og Tvøroyrar kommunu.

**Skjøl**

- Svar til borgarstjóran í.s.v. viðmerking hansara til sáttmálan
- Uppskot til samstarvssáttmála, sent til Jóannes Eidesgaard við viðmerkingar
- Uppskoti til samstarvssáttmála, sum varð sent til viðmerkingar
- Móttøkuváttan í.s.v. viðmerkingar frá Súsonnu Bertholdsen
- Móttøkuváttan í.s.v. viðmerkingar frá havnarmeistaranum
- Uppskot til samstarvssáttmála, sent til viðmerkingar innanhýsis
- Re: Klaksvíkar kommuna og Dragin



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**20.30.00-A00-1-18**

## 4. Stadseting av nýggjum skúla - byrjandi umrøða

### Málsfrágreiðing

Forkvinnan í mentanarnevndini ynskir, at byrja umrøðuna av nýggjum skúla á Tvøroyri.

Forkvinnan upplýsti, at støðutakan til staðseting av nýggjum skúla er týdningarmikil, at taka skjótast til ber.

Anita Vibergsdóttir skjeyt upp, at skipaður verður fyri einum evnisdegi skjótast gjørligt, har framtíðar skúlin á Tvøroyri er til umrøðu.

**Mentanarnevndin, 30. apríl 2018, pkt. 13:**
Mentanarnevndin samtykti, at taka undir við hugskotinum frá Anitu Vibergsdóttir, og málið verður endaliga viðgjørt á býráðsfundi 7. mai 2018.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini, at skipað verður fyri einum evnisfundi áðrenn summarferiuna viðvíkjandi nýggjum skúla í Tvøroyrar kommunu heruppií staðseting og innrætting av skúlanum helst um mánaðarskiftið mai/juni í ár.

**29.00.00-100-2-18**

## 5. Kunning um brúk av kommunulækna-hølum í.s.v. skriv frá Kommunufelagnum

### Málsfrágreiðing

Signar Dam, kommunulækni, kunnaði í farna mánaða forkvinnuna í sosialu nevnd, Súsonnu Bertholdsen, um, at sáttmálaloysi er millum kommunulæknafelagið og Heilsutrygd og væntast kundi ti verkfall. Tí spurdi Signar Dam, um Tvøroyrar kommuna, sum varðar av viðtalhølinum hjá kommunulæknanum, gevur kommunulæknunum á Tvøroyri loyvi til at brúka viðtaluhølið ímeðan sáttmálaloysi er. Málið bleiv viðgjørd á fundi í sosialu nevnd tann 28. mars í ár.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Síðani er Kommunufelagið komin við einum skrivi og tilmæli í hesum sambandi, tí fleiri kommunur hava vent sær til Kommunufelagið við hesum spurningi. Borgarstjórin ynskir tí málið til nýggja viðgerð í sosialu nevnd, sí viðfestu skjøl í málinum.

Sosiala nevnd hevur aftur vidgjørt málid 30. april 2018, og meirlutin í nevndini mælir til, at hølini eru tøk hjá kommunulæknum at brúka óansæd um talan er um verkfall ella ikki. Henda støda vid atliti til borgarar í einum trygdar- og tilbúgvingarhøpi.

**Sosiala nevnd, 28. marts 2018, pkt. 6:**
Sosiala nevnd tók kunningina frá Signari Dam til eftirtektar, og ynskir at kommunulæknin fær loyvi til at brúka viðtaluhølini ímeðan sáttmálaloysi er.

**Sosiala nevnd, 30. april 2018, pkt. 2:**
Sosiala nevnd tók kunningar-skrivið frá Kommunufelagnum, dagfest 17. april 2018, til eftirtektar.

Meirlutin í sosialu nevnd: Súsanna Bertholdsen og Bogi Johannesen ynskja, at kommunulæknahølini eru tøk hjá læknum at brúka óansæð um tað er verkfall á økinum ella ikki. Meirlutin ynskir ikki, at leggja seg út í eitt møguligt verkfall. Hetta atlit í einum trygdar- og tilbúgvingarhøpi soleiðis at trygdin hjá borgarum ikki verður ávirkað av einum møguligum verkfalli.

Minnilutin í sosialu nevnd: Anita Vibergsdóttir ynskti at fylgja tilmælinum frá Kommunufelagnum, sum er, at skyldan hjá kommununi í mun til at útvega høli til kommunulæknar dettur burtur, um talan verður um sáttmálaloysi millum Heilsumálaráðið/Heilsutrygd á aðrari síðuni og Kommunulæknafelag Føroya á hinari síðani.

## Avgerð

Býráðið tók kunningina um niðurstøðuna hjá sosialu nevnd til eftirtektar.

## Skjøl

- Samskifti við Súsonnu Bertholdsen i.s.v. kunning frá Signari Dam
- Kunning frá skrivaranum í Sjóvar kommunu
- Svar frá kommunustjóranum til borgarstjóran
- Áheitan frá borgarstjóranum um at fáa málið til nýggja viðgerð
- Svar uppá fyrispurning um høli undir streiku.docx



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Móttøkuváttan frá Signar Dam

**83.01.02-A00-1-17**

## 6. Tilmæli frá arbeiðsbólki viðv. heimasíðu og møguligum intraneti

### Málsfrágreiðing

14. desember 2017 niðursetti kommunustjórin ein arbeiðsbólk, ið skuldi koma við einum tilmæli til borgarstjóran viðv. einari tørvsmeting við atliti til eina dagføring av heimasíðuni hjá Tvøroyrar Kommunu.
Harafturat skuldi arbeiðsbólkurin gera eina tørvsmeting við atliti til stovnan av einum intraneti til brúk hjá starvsfólkum í Tvøroyrar kommunu, og at enda gera uppskot til eina samskiftisætlan fyri Tvøroyrar Kommunu.
Arbeiðsbólkurin hevur fylgjandi limir: Esther Rasmussen, Lasse Jensen, Bjarni Nygaard, og Chris Jan Michelsen. Harafturat hevur bólkurin eftir tørvi havt vitjan av stovnsleiðarum og starvsfólkum frá umsitingini.
Til samans hevur arbeiðsbólkurin havt 7 fundir.

### Fígging

100.000 Kr.

### Arbeiðsbólkurin mælir til,

Sí viðhefta tilmæli.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá arbeiðsbólkinum um arbeiði higartil til eftirtektar, og býráðið ynskir at arbeiðsbólkurin arbeiðir víðari við málinum við atliti til at gera útbjóðingartilfarið klárt.

### Skjøl

- Tilmæli frá arbeiðsbólki viðv. heimasíðu og møguligum intraneti
- Radfestingar

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøravegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Viðkomandi sosialar miðlar
- Arbeiðssetningur
- Svar til Lassa Jensen viðv. umbøn um útsetan av tilmælinum

**00.01.10-A00-4-17**

## 7. Kunning um støðuna á eldraøkinum í Suðuroynni

### Málsfrágreiðing

Stýrið fyri Bú- og heimatænastuna í Suðuroynni sendi tann 18. apríl 2018 bræv til løgmann og avvarðandi landsstýrisfólk viðvíkjandi átrokandi fíggjarstøðuni í bú- og heimatænastuni. Skriv er 3. mai 2018 komið frá Fíggjarmálaráðnum við einum yvirliti yvir býti av rakstrarútreiðslum til virksemi í Bú- og heimatænastuni í Suðuroy fyri 2017. Fyri Tvøroyrar kommunu er talan um eina eykaútreiðslu í fyrsta umfari á umleið 650 tús. kr., sí viðfestu skjøl í málinum.

**Sosiala nevnd, 30. apríl 2018, pkt. 7:**
Sosiala nevnd tók kunningina frá Súsonnu Bertholdsen um støðuna í Bú- og heimatænastuni til eftirtektar.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnaði um støðuna - serliga fíggjarstøðuna í Bú- og heimatænastuni í Suðuroynni - sum býráðið tók til eftirtektar.

### Skjøl

- Teldubræv við kunning um skriv stíla til Landsstýrið, apríl 2018
- Skriv til Landsstýrisfólk.pdf
- Tvøroyrar kommuna_Roknskapur og býti av rakstrarkostnaði hjá BHS fyri 2017.pdf



Formansvattan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.00-A00-14-16**

## 8. Uppskot til visjón, tilveru- og virðisgrundarlag fyri Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

Tvøroyrar kommuna hevur síðani á heysti 2016 verið í einari tilgongd, at gera eina visjón og eitt tilveru- og virðisgrundarlag fyri kommununa. Hetta arbeiðið hevur verið kjølfest í Tvøroyrar býráð og skipað við starvsfólka- og evnisfundum og á 10 verkstovum, har starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu og býráðslimir hava luttikið. Ein arbeiðsbólkur hevur samanskrivað tilfari, ið er framleitt á verkstovunum.

Arbeiðið er nú liðugt, og skal formliga góðkennast á býráðsfundinum í dag, sí viðfesta uppskot.

### Avgerð

Býráðið samtykti, at góðkenna uppskot til visjón-, tilveru- og virðisgrundarlag, men tók undir við viðmerkingini frá Kristinu Roest um, at vinnulivið verður meira sjónligt í virðisgrundarlagnum.

### Skjøl

- Uppskot til visjón, tilveru- og virðisgrundarlag fyri Tvøroyrar kommunu, 3. mai 2018

tlf 371065
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 18:30**

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Alvi Mortensen

Arfinn H. Leo

Susanna Bertholdsen

Annika Pearce

Bogi Johannesen

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøråvegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 5/2018 |
| Fundardagur | 7. maj 2018 kl. 17:00-18:30 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan